

*- Við áhugaverdum vitanarstørvum, granskingar-og undirvísingarstørvum stinga nýggjar vinnur seg upp, segði Óluva Klettskarð á flokstingi hjá Tjóðveldi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

búgving. Men sláa tey røtur í heimaumhvørvinum, so leitar stórur partur aftur á slóðina eftir lokna útbúgving. Og við teimum komu eisini onnur, ið høvdu givið samfelagnum nýtt íkast.

- Við áhugaverdum vitanarstørvum, granskingar-og undirvísingarstørvum stinga nýggjar vinnur seg upp, legði hon aftrat.

Tað er so mangan prógvað, segði Óluva Klettskarð, at vitanarumhvørvi kastar fleirfaldað aftur. Har lærdir háskúlar verða lagdir, hendir stór menning, búskapurin økist, nýggjar vinnur taka seg upp, og trivnaður og dygd fylgja við.

- Hetta eru munagóð tiltøk, ið høvdu ment primeru vinnuna, so nógv størri virðir vórðu skapt øllum samfelagsbólkum til gagns, segði Óluva Klettskarð á flokstinginum.

*vilmund@sosialurin.fo*

# leiðsluni

avgjaldsskipanirnar skulu endurskoðast. Vaksandi gjøld hava seinastu árini hækkað um skattatrýstið á flestu húsarhald og vinnur og skapa djypri gjáir millum samfelagsbólkar. Føroyskur førleiki skal mennast. Íløgur og politisk átøk skulu vigast eftir, um tey menna føroyskan førleika og kappingarførið hjá føroyskum fyritøkum. Gjáirnar millum samfelagsbólkar og økir í landinum skulu smalkast. Kommunurnar mugu nú leggjast saman, so vit fá økir í landinum, sum kunnu kappast í rímiligari javnvág. Samstundis má kommunuskattur og landsskattur endurskoðast.

* Flokstingið staðfestir, at tey, sum umboða loysingarrørsluna, sjálvræðis-og ábyrgdarleiðina, á tingi, eru floksins parlamentariski spjótsoddi, hinvegin eru øll tey samhugaðu, ung sum eldri, kjarnin í stríðnum fyri teimum frælsu Føroyum. Tí má stríðið fremjast tveystreingjað ímillum grasrøturnar og á tingi, sum hevur avmarkað seg sjálvt við donskum rættindamørkum.

* Val er í hondum. Allur politikkur Tjóðveldisins miðar treytaleyst eftir málum knæsett í stevnu floksins. Einar solidariskar og sjálvstøðugar Føroyar. Eftir eitt val hava vit tvær rásir at ganga eftir. Hin fyrra er ein fullveldissamgonga undir tjóðveldisleiðslu, og hin seinra er ein umbótanarsamgonga und-ir tjóðveldisleiðslu. Fyrra atløgan treytar sjálvsstýrisflokkarnar, meðan hin seinra treytar samríkjaflokkarnar. Skal bót og bati spyrjast burtur úr tjóðini til frama, er Tjóðveldi til reiðar at taka ovastu leiðslu landsins á sínar herðar. Uttangarðs parlamentariska virksemi er líka neyðugt í báðum førum".



*- Tit skipa fyri hópin av tiltøkum og eru til dystin fús í ymiskum kjaki, segði Bergtóra Høgnadóttir um leiklutin hjá Unga Tjóðveldi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Bergtóra fegnaðist um Unga Tjóðveldi

**FLOKSTING - Unga Tjóðveldi er framvegis sera virkið. Vit hava eina góða og garvaða kjarnu, og haraftrat leggjast skilagóð fólk aftrat. Hetta er fantastiska stórt – og er einasta gongda leiðin, segði Bergtóra Høgnadóttir á flokstingi leygardagin**

**Vilmund Jacobsen**

Í síni røðu á flokstinginum vísti Bergtóra Høgnadóttir eitt nú til ein fund, sum herfyri var í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag.

- Her varð sagt, at ov lítið samskifti er millum tingfólk, lokalpolitikarar og økisfelagið. Eg kann ímynda mær, at somu sjónarmið eisini eru aðrastaðni, legði hon aftrat.

Bergtóra segði seg fegnast um, at Annita á Fríðriksmørk er komin í nevndina í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag, og hon segði seg eisini fegnast um prátið, at flokkurin eigur at skipa seg betri.

- Vit eiga at kunna meiri um tingarbeiði, og ikki minst eiga vit at fáa kjakið og hugburðin hjá feløgunum inn í kjakið í løgtinginum. Tað hevði verið veldugt, um vit kundu kjakast, sparrast og fingið íblástur um viðurskifti, sum høvdu verið skilagóð at tikið fram.

Løgtingskvinnan helt, at tingið er eitt áhugavert forum, og nógv spennandi fer fram á tingi.

- Hinvegin kann løgtingið eisini gerast ein ostaklokka, har vit stundum fokusera meiri upp á, hvat tey í hinum flokkunum siga og meina – heldur enn at virka fyri tí, sum baklandið brennir fyri. Sjálv haldi eg ikki, at tað er so, men kortini síggi eg ein vanda. Tí eri eg avgjørt við upp á, at vit hittast og tosa um politikk floksins og um, hvat bylgist í barminum hjá fullveldisfólkum.

## Nógvir glottar

Bergtóra Høgnadóttir segði seg síggja nógvar glottar.

- Unga Tjóðveldi er framvegis sera virkið. Vit hava eina góða og garvaða kjarnu, og haraftrat leggjast skilagóð ung fólk aftrat. Hetta er fantastiska stórt – og er einasta gongda leiðin. Eg havi viðhvørt sagt, at vit landspolitikarar kunnu spegla okkum í teimum ungu.

Løgtingskvinnan segði seg eisini fegnast um øll tey tiltøk, sum Unga Tjóðveldi skipar fyri.

- Tit skipa fyri hópin av tiltøkum og eru til dystin fús í ymiskum kjaki – og eisini tvørpolitiskt eru tit við upp á tað, segði Bergtóra Høgnadóttir á flokstingi hjá Tjóðveldi leygardagin.

*vilmund@sosialurin.fo*

# Friður um Heina

**FLOKSTING Hóast Heini O. Heinsen, løgtingsmaður, ikki slapp á listan, sum Norðoya Tjóðveldisfelag hevur gjørt til løgtingsvalið komandi, var fullkomin friður um hetta mál á flokstinginum**

**Vilmund Jacobsen**

Eingin av teimum, sum hevði orðið á røðarapallinum á flokstingi hjá Tjóðveldi leygardagin, dró málið um Heina O. Heinesen fram.

Hinvegin var hetta uppi og vendi úti í túninum, tá steðgur var. Fólk ynsktu Heina góða eydnu, nú hann er í uppskoti til listan í Suðurstreymoyar Tjóðveldisfelag.

Sjálvur sigur Heini, at nú allar Føroyar eru eitt valdømi, er ikki so avgerandi, hvørjum listan valevnini eru á, og at hann líka so væl kann verða á lista í Suðurstreymoy sum í Norðoyggjum.

- Einki er liðugt, fyrr enn alt er liðugt, sum hin 72 ára gamli løgtingsmaðurin tók til.

*vilmund@sosialurin.fo*